# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein álvarsamar boðskapur

Maðurin, sum í ár fekk friðavirðsløn Nobels, hevur við røðu síni sent heiminum ein týdningarmikla boðskap: Muhammad Yunus sigur, at heimsins leiðarar nú av álvara eiga at fara í hernað móti fátækradøminum heldur enn at nýta miliardir til kríggj. Fátæktin er ein tann største hóttanin móti heimsfriðinum, sigur Yunus. Meira enn ein milliard menniskju livir fyri minni enn ein dollara um dagin. Hetta má enda galið. Tað kann ikki vinnast á yvirganginum við hernaðarligari megi. Vit skulu fordøma yvirgang, men vit skulu berja hann niður við at beina fátæktina í heiminum burtur. Hetta, at USA hevur brúkt 530 milliardir til krígglð í Irak gevur ongan frið sigur Yunus, og alt bendir á, at hann hevur rætt í hesum.

Yunus verður nevndur bankamaður teirra fátæku. Hann, ið er professari í búskaparfrøði, hevur í heimlandi sínum skapt eina bankaskipan, ið ger tað møguligt hjá teimum fátæku at lána uttan trygd til at stovna smáfyritøkur. Skipanin, ið er ein stór succés, er nú útbreidd til 40 lond. Seinasta landið, ið hevur tikið smábankaskipan Yunusar til sín er Kina. Eygleiðarar vænta sær ómetaliga nógv av hesi skipan. Yunus ætlar at nýta peningin til eina verkætlan at framleiða ódýrar matvørur, til eitt eygnahospital og annað vælgerandi virksemi.

Norska nobelnevndin, sum hevur gjørt av at veita Yunus friðarheiðurslønina, ger vart við, at henda avgerð skal skiljast sum, at nú má ein dialogur fáast við muslimska heimin. Fáa vit ikki henda dialogin skjótt, kann tað enda við einum ræðuligum ragnaroki, har eingin verður vinnari, men øll gerast taparar. Formaðurin í nobelnevndini ávarar staðiliga móti tí dæmonisering av muslimska heiminum, sum er íkomin eftir yvirgangsatsóknina móti World Trade Ceneter á sinni. Avgerðin er sostatt eisini ein stuðul til teir moderatu muslimar, sum virka fyri friði og dialogi í heiminum. Vónandi fer hetta at geva úrslit.

**Sosialurin**

## Eingin virðing fyri Havnini



**HANUS JENSEN**
Í Havn

Fyritøkur og skip verða í hesum døgum handlað fyri so nógvar milliónir, at menn nú eru komnir í rasshaft av øllum milliónunum, teir liggja inni við. Tíverri er tað soleiðis í okkara samfelag, at eigur tú milliónir, so føra hesar til ávísa makt. Tú kanst við milliónunum sjálvt fáa okkara borgmeistara og formannin í havnarnevndini at spæla við, sjálvt um hvør Hanus og Janus eru hart ímóti ætlanunum, hesir millióningar leggja fyri dagin.

Einaferð var tað Skálaborg á Skálatrøð, nú eitt flótandi bingjuhotel, sum kemur at oyðileggja umhvørvið við Høgukaj, Lágukaj, Müllers pakkhús, Skeiva pakkhús og kolbrúnna. Tórshavnar kommuna hevur brúkt milliónir at fríðka um Müllers pakkhús og gjørt vakrar gongubreytir – og har liggur sluppin Westward Ho við kolbrúnna, sum júst er umvæld eisini fyri milliónir, sum eitt prýði og minni fyri farna tíð. Tórhavnar havn hevur flutt smábátar, so Westward Ho og Norðlýsið kunnu liggja í vøkrum umhvørvi.

So koma nakrir millióningar við hugskotum og tekningum. Og fyrstur at leypa á leistum í útvarpinum og lovprísa bingjuhotellinum er sjálvur borgarstjórin. "Gott hugskot" siga bæði borgarstjórin og formaðurin í havnarnevndini uttan at nevna eitt orð um gamla umhvørvið har á leiðini, sum ikki tolir at missa útsýnið fyri einum nýmótans bingjuhotelli.

Har á leiðini er blivið so vakurt og friðsælt, og fleiri og fleiri fólk hava gleði av hesi vøkru perlu. Kemur flótihotellið, so verður friðurin burtur einaferð med alla.

Tíbetur hevur Bátafelagið í Havn við 700 limum og vinnufyritøkur harðliga mótmælt ørvitisætlanini á Vestaruvág. Ætla millióningarnir at byggja sær flótandi hotel, so er at fara inn á Sund, tí har er ovmikið av plássi. Bara ikki á Vestaruvág.

Róðrarfelagið Knørrur heldur til í aldargomlum neysti við Lágukaj. Felagið eigur tríggjar kappróðrarbátar. Aldargamla neystið kann bara hýsa tveimum bátum, tí má triði báturin standa í eini bingju. Felagið hevur í nógv ár uttan úrslit roynt at fingið betri venjingarumstøður og pláss til bátarnar og hóskandi bátadrátt.

Munurin millum Róðrarfelagið Knørr og menninar aftan fyri flótandi hotellið eru milliónirnar, sum borgarstjórin og formaðarin í havnarnevndini síggja fyri sær.

Menninir aftan fyri hotellætlanina siga, at vit eiga har á leiðini eina perlu. Ja, vit eiga eina vakra perlu har á leiðini, sum fólk eru so fegin um. Men eitt bingjuhotell má ikki oyðileggja vøkru perluna.

Vilja menninir sleppa av við nakrar av milliónunum, so kunnu teir finna fram aftur verkætlanina at byggja eldraíbúðir á Skálatrøð fram við tí høga beninum. Ein kærkomin ætlan.

Tað er mín vón, at allir havnarborgarar, tað veri seg eisini Bátafelagið og vinnan við Vestaruvág, arbeiða við hond og fót ímóti hotelsætlanini. Ein sonn katastrofa um vakra perlan við Vestaruvág skal oyðileggjast av einum bingjuhotelli. Latið Vestaruvág fáa frið.

**PS** Hoyrdi í morgunsendingini hósmorgunin ein av stigtakarunum siga, at fólk vóru positiv um hotellætlanina. Stigtakarin og undirritaði ganga óivað ikki somu leiðir, tí eg havi ikki møtt einum persóni, sum tekur undir við at byggja flótandi hotell og oyðileggja perluna við Vestaruvág.



**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.